

www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 03 - 2013

# Eldborg um Ekvator við kós móti Eysturafrika

Eftir at hava bóltast her norðuri í Norskahavinum og Norðsjónum í hálvtfjóðra ár, er Eldborg hjá Skansi Offshore farið at royna nýggjar leiðir. Eldborg fór úr Norra 12. feburar og skal nú arbeiða fyri Statoil Mozambique. Skipið fór fyrst til Southampton at lasta, og 16. februar varð kósin sett suður eftir. Sunnumorgun fór skipið um Ekvator, og gamli siðurin við Ekvatordópi varð hildin. Eisini varð borðreitt við Ekvatorkøku. Jan Ejdesgaard er skipari ávegis til Mozambique. Hetta er fyrstu ferð, at eitt av veitingarskipunum hjá Skansi Offshore hevur fingið sáttmála uttan fyri Norðsjógvin. Skansi Offshore hevur gjørt sáttmála við Statoil at arbeiða á nýggju gassleiðunum út fyri Mocambique og Tanzania. Myndirnar eru frá søguligu løtuni, tá Eldborg fór um Ekvator.